norden
NORÐURLANDAHÚSIÐ

## Starv í Norðurlandahúsinum

Eitt tíðaravmarkað fulltíðarstarv innan fyriskipan, fyrisiting og marknaðarføring er leyst at søkja í Norðurlandahúsinum. Starvssetanin er avmarkað til eitt ár, frá 1. juli 2010 til 1. juli 2011.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar og snúgva seg í høvuðsheitum um samskifti við samstarvspartar og viðskiftafólk, fyriskipan av fundum, ráðstevnum og mentanarligum tiltøkum, marknaðarføring og dagføring av heimasíðu, og fyrisitingarligar uppgávur.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at umsøkjarin í minsta lagi hevur lokið HH, HF, student- ella FHS- prógv. Tað er ein fyrimunur at hava góðan málkunnleika umframt, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni, er fyrikomandi, dugir at arbeiða sjálvstøðugt og er áhugaður í mentanarligum virksemi.

**Løn og setan:**
Sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið og "personale adm. regler for Nordisk Ministerråd". Ynskiligt er, at viðkomandi kann byrja 1. juli 2010.

**Umsókn**
Umsóknin má verða Norðurlandahúsinum í hendi í seinasta lagi 15. mai 2010.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Niels Halm, stjóri í Norðurlandahúsinum á tlf. 351 351

NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
postboks 1260 | 110 tórshavn | telefon + 351351
telefax + 351350 | e-mail:nlh@nlh.fo | http://www.nlh.fo

**Norðurlandahúsið** er stovnur undir Norðurlendska Ráðharraráðnum og Føroya Landsstýri. Endamálið við Norðurlandahúsinum er at varpa ljós á norðurlendska mentan í Føroyum, føroyska mentan í Norðurlondum og at hýsa føroyskum tiltøkum í


# Hygg HER

**Nú er várið í hond. Skalt tú velta tær havan, javna ójavnar, grava út fyri garði, oljutanga, rottanga, gera rennur ella annan maskingrevstur fyri sámuligan prís.**

**– Ring 28 41 56 og vit kunnu tosa saman.**

**HEÐIN BERTELSHEN**
**Bóndaheygur 13 · 100 Tórshavn**


**Vágs Kommuna**

søkir
## avloysara fyri starvsfólk í barnsburðarfarloyvi

Søkt verður eftir skrivstovufólki til kommunuskrivstovuna í tíðaravmarkað starv frá 1. juli 2010, niðursetta tíð.

**Vit vænta:**
- at umsøkjarin hevur útbúgving ella royndir innan skrivstovuyrki.
- At umsøkjarin hevur kunnleika til bókhald.
- at umsøkjarin hevur góðan málkunnleika, og ert før/ur fyri at samskifta munnligt og skrivligt.
- at umsøkjarin hevur góðan teldukunnleika.

Starvið er lønt samsvarandi sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Kommunuskrivstovuna tlf. 733000 ella Petry Joensen, býráðsskrivara á telefon 733008.

Umsókn saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skal verða Vágs Kommunu í hendi í seinasta lagi 29. apríl 2010 kl. 12.00.

Umsóknin skal sendast til:

VÁGS KOMMUNU
Vágsvegur 30
FO-900 Vágur
Viðm. Skrivstovufólk

**Vágs Kommuna**
**www.vagur.fo**

## Til øll sjónleikaráhugað!

Hevur tú hug at gerast partur av virkseminum í Sjónleikarhúsinum í Havn, so tekna teg sum lim í Havnar Sjónleikarfelag.

Send teldupost við navni, bústaði og telefonnummari til sjonleik@post.olivant.fo og kom á aðalfund 25. apríl kl. 16.

Vit síggjast í Sjónleikarhúsinum

**Havnar Sjónleikarfelag**



## Dugni søkir eftir starvsfólki til teldustovuna

**Talan er um eitt 30 tíma starv, har mikudagur í løtuni er frídagur. Starvið skal setast 1. juni ella skjótast til ber.**

**Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum**
- at finna styrkir og førleikar hjá næminginum. At menna, upplæra og geva næminginum vinnuligar royndir sum eru at javnmeta við vanlig arbeiðskor.
- at vera við til at gera deildina í Smiðjugerði til eitt mennandi arbeiðspláss hjá okkum øllum
- talan kann vera um at arbeiða á øðrum eindum. Sí www.dugni.fo

**Vit vænta at tú**
- hevur viðkomandi útbúgving og royndir
- hevur evnir at læra frá tær
- er opin fyri áhaldandi at fáast við persónliga menning, við atlit til virka í einum "stuðlandi og mennandi umhvørvi"
- er fleksibul og hevur evnir at samstarva, eisini við aðrar fakbólkar
- sær møguleikar heldur enn avmarkingar
- ert hugskotsfullur, kreativur og positivur
- hevur førleika at arbeiða við teldu, kopimaskinu, digitalmyndatóli v.m. Tænastur sum vit bjóða eru t.d. - gera visitkort, sangheftir, taka avrit, seta upp, laminera, spiralinnbinda v.m.
- fyrimunir eru um tú hevur arbeitt við programmum so sum, Illustrator, Indesign, Photoshop, o.l.

**Vit bjóða**
- spennandi arbeiði, har góðir møguleikar eru fyri ávirkan
- góðar og humoristiskar samstarvsfelagar
- mennandi og gevandi gerandisdag

**Løn og setanartreytir**
- starvið hevur tilvísing til deildarleiðaran og lønin verður javnsett við námsfrøðiliga økið.

Meira fæst við at vita um starvið við at venda sær til:

Hannu Jacobsen, deildarleiðari á tlf. 350070

**Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 25. apríl 2010**

Umsókn saman við prógvi, royndarváttan v.m. skal sendast til:

Sjálvsognarstovurin DUGNI
Smiðjugerði 6. kj.
Postboks 301
110 Tórshavn

brævbjálvin skal merkjast »umsókn«

dugni

DUGNI@DUGNI.FO · WWW.DUGNI.FO